# Tórshavnar Kommuna

Innkeyps- og útboðspolitikkur

fyri keyp av vørum og tænastum

## Innihaldsyvirlit


**ENDAMÁL** ........ 3

**MEGINREGLUR FYRI INNKEYP Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU** ........ 3

**HVØR ER UMFATAÐUR AV INNKEYPS- OG ÚTBOÐSPOLITIKKINUM** ........ 3

**HVAT ER KOMMUNALT INNKEYP** ........ 4

**KRØV TIL INNKEYP** ........ 4

**ÚTVEITAN (KAPPINGARÚTSETAN)** ........ 5

**ATLIT TIL INNKEYP UMHVØRVI OG CSR** ........ 5

**ATLIT TIL VEITARAR** ........ 6

**YMISK SLØG AV INNKEYPUM** ........ 6

1. Hissini keyp ........ 6
2. Rammuavtalur ........ 6
3. Útboð ........ 7

**ÚTBOÐ – HUGSJÓNIR** ........ 8

**ÚTBOÐ – YMISK SLØG** ........ 8

1. Alment útboð – allir áhugaðir partar kunnu geva eitt tilboð ........ 8
2. Avmarkað útboð – Avmarkaður skari gevur eitt tilboð ........ 9
3. Kappingarkend samrøða ........ 9

**KUNNING AV ÚTBOÐUM** ........ 10

**MENNING OG BROYTING Í POLITIKKINUM** ........ 10

**INNANHÝSIS ÁBYRGDARBÝTI** ........ 11

**LYKLAORÐ FYRI VÆLEYDNAÐ KEYP** ........ 12

**Endamál**

Endamálið við innkeyps- og útboðspolitikkinum hjá Tórshavnar Kommuna er, at hava skipaði viðurskifti fyri innkeyp og útboð av vørum og tænastum.

Stórar upphæddir verða brúktar á hvørjum ári til innkeyp av vørum og tænastum, og kommunan hevur skyldu til at brúka skattaborgarans pening skynsamt.

Innkeyps- og útboðspolitikkurin ásetur, hvussu stovnar í kommununi skulu fyrihalda seg viðvíkjandi keyp av vørum og tænastum. Yvirskipaða endamálið við innkeyps- og útboðspolitikkinum er, at peningur skattgjaldarans verður nýttur so effektivt sum gjørligt, og at innkeyp og útboð í Tórshavnar Kommunu fer fram eftir meginreglum, sum tryggja effektivitet, gjøgnumskygni og eins viðferð av veitarum.

**Meginreglur fyri innkeyp í Tórshavnar Kommunu**

Meginreglurnar fyri innkeyps- og útboðspolitikkinum hjá Tórshavnar Kommunu, eru grundleggjandi hugsjónirnar undir framtíðar innkeypi og skulu øll innkeyp, sum útgangsstøði, fremjast í samsvari við hesar meginreglur.

Meginreglurnar eru lýstar niðanfyri.

*Virði fyri pening*

Grundhugsjónin í innkeypi hjá kommununi skal til eina og hvørja tíð vera, at størst møguligt virði skal fáast fyri skattgjaldarans pening. Tað merkir, at tilfeingið hjá kommununi skal umsitast á skynsamasta hátt, og kommunan skal velja hóskandi innkeypsloysnir soleiðis, at mest virði fæst fyri peningin.

*Gjøgnumskygni*

Mannagongdirnar fyri innkeyps- og útbjóðingarpolitikkin, skulu leggjast til rættis soleiðis, at hesar tryggja gjøgnumskygni við tí endamálið, at veitarar, borgarar og aðrir áhugabólkar hava álit á, í tráð við kommunalu virðini, at innkeyp og útboð í kommununi eru professionel, óheft og rættvís.

*Fremja og menna kapping*

Kommunan skal, umvegis sín innkeyps- og útboðspolitikk, vera viðvirkandi til at skapa og menna fortreytirnar fyri effektivan marknaða, til frama fyri vinnulívið og samfelagið.

**Hvør er umfataður av innkeyps- og útboðspolitikkinum**

Innkeyps- og úboðspolitikkurin fevnir um Tórshavnar Kommunu og allar deildir og stovnar, ið koma undir rakstrarjáttanina hjá Tórshavnar Kommunu.

**Hvat er kommunalt innkeyp**

Sum partur av virkseminum og í sambandi við tænastuveitingar til borgaran, keypir kommunan vørur og tænastur á privata marknaðinum. Hesi keyp umfata alt frá bíligum og lutfalsliga einføldum veitingum, sum t.d. skrivstovuamboð til meira samansettar og kostnaðarmiklar og vørur og tænastur/verkætlanir, sum t.d. nýggjar skipanir innan KT og samskifti.

Kommunalt innkeyp fevnir soleiðis um allar vørur og tænastur, sum kommunan keypir frá privatu vinnuni. Innkeyp kann fara fram á ymsan hátt, og er ofta tengt at slagnum av keypi og hvussu stóra íløgu talan er um.

Tilboðsfyrispurningar og útboðstilfar skal vera á føroyskum máli.

**Krøv til innkeyp**

Høvuðskarmarnir fyri nær innkeyps- og útboðspolitikkurin gerst galdandi eru staðfestir niðanfyri. Allar upphæddir eru *uttan* MVG.

*1) Keyp úr kr. 50.000 upp í kr. 1.000.000: Minst tvey tilboð skulu umbiðjast*

Fyri keyp, sum eru úr 50.000 upp til 1.000.000 krónur skal kommunan seta seg í samband við í minsta lagi tveir skikkaðar veitarar fyri at fáa eitt tilboð upp á ítøkiligu uppgávuna. Útboðstilgongdin skal leggjast soleiðis tilrættis, at møguligir veitarar, fáa neyvt somu upplýsingar fyri at tryggja, at tilboð verða givin undir somu fortreytum.

Tað er eingin treyt, at uppgávan skal vera *omanfyri* kr. 1.000.000 fyri at vera boðin út. Tað vil siga, at í tann mun tað loysir seg kann kommunan velja at bjóða uppgávuna út, hóast upphæddin er niðanfyri kr. 1.000.000.

*2) Keyp úr kr. 1.000.000: Skulu bjóðast út, men við ávísum undantøkum*[1]

Øll innkeyp av vørum og tænastum yvir kr. 1.000.000 skulu bjóðast út. Tilgongdin til útbjóðing er nærri lýst í avsnittinum um ymisk sløg av útboð.

*3) Rammusáttmálar við virði yvir kr. 1.000.000 skulu bjóðast út*

Ein rammusáttmáli, við einum samlaðum virði upp á meira enn kr. 1.000.000, eigur at vera boðin út eftir somu fortreytum, sum vanligar útbjóðingar. Er rammusáttmálin fyri t.d. tvey ár, og samlaða virðið

[1] Hesi undantøk kunnu td. verða tá einkarstøður gera seg galdandi, um bert ein veitari finst sum umboð fyri ávísa skipan, um veitarar ella vørur/tænastur ikki lúka ávísar góðkenningar ella ásett krøv, um tað ikki svarar seg fíggjarliga, at fara undir eina útboðstilgongd ella um lógaráseting forðar fyri útbjóðing.

er omanfyri kr. 1.000.000 eigur hann at verða boðin út. Er talan um ein rammusáttmála fyri eitt tíðarskeið, longri enn fýra ár, verður virðið roknað fyri fýra ár.

Har tað á ein hvønn hátt kann vera gagnligt, kann kommunan velja at býta eina veiting upp í fleiri vørubólkar. **Endamálið við at býta eina veiting upp, er *ikki* at býta upp fyri at sleppa undan einari útbjóðing, men hinvegin at geva smærri fyritøkum ein møguleika at luttaka í útbjóðingini**, og har við stimbra kappingina, og styrkja møguleikarnar at varðveita framtíðar kapping á økinum. Kommunan skal meta um, í hvønn mun tað er ráðiligt og skynsamt at býta eina veiting upp soleiðis, at møguleiki er, at bjóða uppá partar av samlaðu veitingini.

Samlaða útboðsvirðið skal tí vera tað sama og talan er framhaldandi um *eina* útbjóðing, men við fleiri vørubólkum. Á henda hátt kunnu einstøku fyritøkurnar bjóða seg fram at loysa samlaðu uppgávuna hvør sær, at loysa partar av uppgávuni hvør sær ella at fara saman í konsortium, og loysa samlaðu uppgávuna í felag.

Mark er tó fyri, hvussu nógv ein uppgáva kann býtast upp og her skal skynsemi brúkast. Kommunan kann tilskila sær rættin til at velja ein *ella* fleiri veitarar. Á henda hátt kann tryggjast, at innkeypini eru effektiv samstundis sum atlit verða tikin til fyritøkur, sum eru kappingarførar á ávísum økjum, men sum ikki megna, at veita eina breiða og samlaða veiting.

**Útveitan (kappingarútsetan)**

Í samband við kappingarútsetan ella útveitan, ger kommunan meting av í hvønn mun tað er skynsamt, at útveita uppgávur og tænastur til privatar veitarar, við tí endamálið, at varðveita fokus á kommunala kjarnuvirksemi innanhýsis í kommununi. Kommunan skal tí eftirkanna sínar uppgávur í minsta lagi 3. hvørt ár fyri at meta um og gera raðfestingar av, hvørjar uppgávur hóskandi kunnu veitast út.

**Atlit til innkeyp umhvørvi og CSR**

Fyri at minka um frámerkið vit seta á heimin, umhvørvið og veðurlagið, og við virðing fyri sama, skal strembast eftir at keypa inn í mun til neyðugan tørv.

Umframt upphæddir, skal atlit takast til samfelagsgagnlig áhugamál, sum fremja burðardygga menning og grønar marknaðir, sum til dømis umhvørviskrøv, har kommunan keypir vørur, sum í síni livitíð hava betri ávirkan á umhvørvið. Onnur krøv og atlit kunnu vera altjóða krøv og/ella góðkenningar, viðurkend vørufrámerki fyri umhvørvi og burðardygd, veitarar, ið fylgja st-heimsmálunum fyri burðardygga menning og veitarar, ið hava eitt ávíst tal av lærlingum, starvsfólk í vardum starvi ella líknandi.

Dømi upp á serlig atlit (samfelags-, arbeiðsmarknaðar- og umhvørvisvinarlig) í kommunalum innkeypi kunnu vera:

- Keyp av umhvørvisvinarligum vørum og tænastum (td. umhvørvisvinarligir bilar)

- Vørur gjørdar burturúr endurnýtslutilfarið, vørur við langari livitíð, vørur, sum í allari livitíðini dálka sum minst
- Val av veitara, har samlaða dálkingin av framleiðslu og flutningi av vøruni er sum minst
- Veitarar, sum hava eina ávísa mongd av lærlingum, i mun til stødd av fyritøku, kunnu nýta hetta sum kappingarparametur
- Veitarar, sum hava fólk við vardum størvum (í mun til stødd av fyritøku), kunnu nýta hetta sum kappingarparametur

**Atlit til veitarar**
Um feilir vísa seg í vøruni ella vøran í aðrar mátar vísir seg ikki at lúka treytirnar í tilboðsfyrispurninginum ella útboðnum, hevur tað týdning, at TK kann venda sær aftur beinleiðis til veitaran av vøruni fyri at fáa viðurskiftini í rættlag skjótast tilber. TK eigur tí at tryggja sær, at veitarin er góðkent umboð í Føroyum at veita bæði garanti og aðrar umvælingar og tænastur á viðkomandi vørur.

**Ymisk sløg av innkeypum**
Í samband við innkeyp sum heild, verða fleiri innkeypshættir nýttir. Hvussu valt verður at keypa inn, kann vera tengt at fleiri viðurskiftum, til dømis hvør vøra ella tænasta skal keypast, hvussu stóra upphædd talan er um, hvussu nógvar fyritøkur eru á marknaðinum og um vøran ella tænastan javnan ella afturvendandi verður keypt. Mest vanliga nýttu innkeypshættirnir verða umrøddir niðanfyri.

**1. Hissini keyp**
Hissini keyp umfatar vanliga smærri keyp, sum kosta lutfalsliga lítið. Í summum førum er eisini talan um vørur og tænastur, sum verða keyptar heldur sjáldan. Vanliga verður ikki nógv orka løgd í tílík keyp og eru hesi ofta vanakeyp.

Innkeypsmannagongdin er sostatt eyðmerkt av, at lutfalsliga avmarkað vitan verður fingin til vega um vøruna, umframt at keypt verður ofta uttan at kanna, hvat fæst á marknaðinum. Sostatt er talan um ein innkeypshátt, sum er merktur av, at eingin kapping er um vøruna/tænastuna. Hetta má eisini metast at vera ein mannagongd, sum kann góðtakast í førum, har talan er um smærri keyp, so tíðin, kommunan nýtir at keypa inn, samsvarar við virðið á keypinum.

Tað er hugsandi, at tað eru fleiri keyp, ið koma undir hendan innkeypsháttin, enn ráðiligt er. Her verður sipað til keyp, sum antin kosta lutfalsliga nógv ella keyp, sum eru heldur torskild, har kommunan eigur at leggja meira orku í at kanna, hvørjar veitingar kunnu fáast á marknaðinum og til hvønn prís. Eisini kann tað hugsast, at smærri afturvendandi keyp kunnu effektiviserast, um annar innkeypsháttur verður nýttur.

**2. Rammuavtalur**
Rammuavtala er ein sáttmáli millum veitara og innkeypara um keyp av vørum fyri ein ávísan prís í eina avmarkaða tíð. Slíkir sáttmálar verða ofta bodnir út. Heldur enn at vera ein innkeypsháttur í sær

sjálvum, er ein rammuavtala úrslitið av einari útbjóðing, sum staðfestur ein prís fyri keyp av ávísum vørum og tænastum.

Í einari rammuavtalu eru vanliga ikki krøv til, at ávísar nøgdir av einari vøru skulu verða keyptar. Rammuavtalur eru serliga væl egnaðar, tá talan er um vørur og tænastur, sum verða keyptar við jøvnum millumbilum, og í lutfalsliga stórum mongdum yvir tíð.

Í høvuðsheitum eru tvey sløg av rammuavtalum. Hesi eru:

1. Rammuavtala við *einum* veitara: Avtala er gjørd um keyp av somu vøru frá einum veitara. Vanliga er keyparin bundin at keypa allar vørur og tænastur, sum avtalan fevnir um, frá sama veitara
2. Rammuavtala við *fleiri* veitarum: Avtala er gjørd um keyp av samlíkum vørum og tænastum frá fleiri veitarum

**3. Útboð**

Útboð kann í stuttum lýsast sum ein innkeypsháttur, har kommunan heitir á eitt størri ella avmarkað tal av veitarum um at geva eitt tilboð upp á eina ávísa uppgávu í kapping við onnur. Útboð fylgja serligum ásettum mannagongdum.

Fyri at skapa álit og tryggja veitarum javnbjóðis møguleika at bjóða upp á innkeyp hjá kommununi, er vanliga tilgongdin í samband við almennar útbjóðingar, at ávís krøv verða sett til útbjóðingarnar. Hesi krøv kunnu til dømis vera:

- Krav um, at uppgávur omanfyri eina ásetta upphædd skulu bjóðast út
- Neyvt og greitt innihald í útbjóðingartilfari (t.d. greið kunning um tað, ið uppgávan snýr seg um)
- Hvussu útbjóðingin verður almannakunngjørd (t.d. hvussu og hvar skal lýsast)
- Greiðar mannagongdir í samband við val av veitara (t.d. greið krøv í útbjóðingartilfari, greið vekting, greitt metingarstøði, at viðgerðin av tilboðum er almenn o.s.fr.)

**Útboð – Hugsjónir**

Í samband við eina útbjóðingartilgongd skulu tær grundleggjandi hugsjónirnar í kommunala innkeypspolitikkinum, nevniliga virði fyri pening, gjøgnumskygni og at fremja kapping vera sjónligar í allari útbjóðingartilgongdini.

Ein útbjóðing setur krøv til førleikar hjá øllum pørtum, bæði hjá kommununi og vinnuni, og er tað tí umráðandi, at útboðshátturin hóskar til ítøkiligu uppgávuna.

Tá støða skal takast til, hvør útboðsháttur verður brúktur, skulu atlit takast til:

- Kappingina
- Fjøltátni í uppgávuni
- Bygnaðin á marknaðinum
- Umsitingarligu byrðuna, sum stendst av útboðnum

**Útboð – ymisk sløg**

Mest vanliga nýttu og væl royndu útboðshættirnir eru lýstir niðanfyri.

**1. Alment útboð – allir áhugaðir partar kunnu geva eitt tilboð**
Eitt *alment útboð* er eyðkent við, at allir áhugaðir partar fáa útbjóðingartilfar sendandi og kunnu geva eitt tilboð, tað vil siga, at opið er fyri øllum at geva tilboð. Kommunan hevur skyldu til at tryggja sær, at serliga størri *almenn útboð* eru væl lýst í viðkomandi miðlum soleiðis, at áhugaðir veitarar hava nóg góðar møguleikar, at verða kunnaðir um útboðið og hava stundir at skráseta seg á útboðsportalinum. *Sí kunning av útboðum niðanfyri*.

*Alment útboð* er ein væl egnaður útboðsháttur, tá talan er um vørur og tænastur, ið eru lutfalsliga líkar (standardiseraðar), og har kappast verður um prís. Her eigur tað at vera lutfalsliga einfalt at samanbera tilboðini.

Ein fyrimunur við *almennum útboði* er, at tað í fleiri førum er hesin útboðshátturin, sum í størstan mun tryggjar kappingina. Hinvegin kann hesin útboðsháttur vera orkukrevjandi bæði fyri veitara og kommununa, serliga tá nógvir veitarar eru. Fyri veitara, tí hesin brúkar nógva orku uppá at gera tilboð og verður kanska skildur frá longu í fyrsta umfari, tí hann ikki lýkur fortreytirnar, og fyri kommununa tí hon hevur hópin av tilboðum, ið hon skal meta um.

Í samband við *almennum útboði*, er kommunan heilt útihýst frá at seta seg í samband við veitara um tey grundleggjandi viðurskiftini í tilboðnum. Td. um prísir, prísstøðið og stødd á avsláttri. Um hesi viðurskifti verða broytt er váðin, at kappingin verður avlagað.

**2. Avmarkað útboð – Avmarkaður skari gevur eitt tilboð**

Í samband við *avmarkaðum útboð*, hevur kommunan møguleika fyri at nýta undangóðkenning, har valið av veitara verður býtt sundur í tvær fasir. Fyrra fasan er undangóðkenning og seinna er útboðstilgongdin. Undangóðkenningin avmarkar talið av veitarum, ið geva tilboð.

Undangóðkenningin tekur støði í teimum fortreytunum, ið verða settar fyritøkunum viðvíkjandi at skula lúka ávís viðkomandi fíggjarlig og teknisk krøv[2] fyri at sleppa upp í part. Minstukrøv skulu vera greitt tilskilað í útbjóðingartilfarinum. Ein fyritøka, ið verður undangóðkend, fer víðari í útbjóðingarumfarinum, og kann bjóða upp á eina verkætlan.

Ein undangóðkenning kann fara fram við at lýsa alment eftir umsóknum til undangóðkenning ella við at heita á fyritøkur, sum myndugleikin metir hava førleikar at bjóða upp á verkætlanina[3]. Tá fyritøkur eru undangóðkendar, sendir kommunan eina skrivliga umbøn til hesar fyritøkurnar um, at bjóða upp á veitingina, sambært útbjóðingartilfarinum umvegis útboðsportalin.

Ein fyrimunur við *avmarkaðum útboði* er, at eitt færri tal av fyritøkum skulu undir at gera tað umfatandi og kostnaðarmikla arbeiðið, sum krevst fyri at veita tilboð, serliga í samband við størri verkætlanir. Harumframt er talan um, at einans tær fyritøkur, sum veruliga hava førleikarnar at gera arbeiðið, eru við í metingini.

Fyrimunir við *avmarkaðum útboði* er, at kommunan kann spara útreiðslur í samband við meting av tilboðum, av tí at talið av tilboðum, ið koma inn er avmarkað. Hinvegin kann tilgongdin taka longri tíð, tí hendan fevnir bæði um eina undangóðkenningar- og útboðstilgongd.

Eisini í samband við *avmarkaðum útboði*, er kommunan heilt útihýst frá at seta seg í samband við veitara um tey grundleggjandi viðurskiftini í tilboðnum. Td. um prísir, prísstøðið og stødd á avsláttri. Um hesi viðurskifti verða broytt, er váðin at kappingin verður avlagað.

**3. Kappingarkend samrøða**

Tann triði høvuðsútboðshátturin er kappingarkend samrøða. Hetta er tann hátturin, sum verður minst nýttur, tí hann er best hóskiligur til heilt truplar og samansettar verkætlanir. Í kappingarkendari samrøðu hevur kommunan samrøður við møguligar veitarar og kann síðani avmarka talið av veitarum í so fall, at hetta er nóg mikið at fremja kappingina. Kommunan skal síðani í framhaldandi samrøðum biðja fyritøkurnar lýsa, hvussu teir ymsu partarnir av uppgávuni kunnu loysast. Tá kommunan hevur nóg mikið av upplýsingum/uppskotum til loysnir fyri at lýsa og avmarka verkætlanina, kann arbeiðið vera boðið út millum somu fyritøkur, sum hava verið við í samrøðunum. Tað skal viðmerkjast, at hóast

[2] Til dømis viðkomandi royndir frá líknandi verkætlanum, at fyritøkan hevur møguligar kravdar góðkenningar osfr.

[33] Skikkaðir veitarar

talan er um áhaldandi samrøður við fyritøkur er “sjakring” bannað. Sjakring er ein mannagongd, har myndugleikin, eftir at tilboð eru komin inn, letur upp fyri møguleikanum at broyta tilboð og fer sostatt inn í samráðingar við nakrar fyritøkur um t.d. at broyta prísin.

Innan ES verður hesin formur einans nýttur í heilt serligum førum. Her kann talan vera um uppgávur, sum eru sera truplar at lýsa, t.d. tí myndugleikin ikki hevur møguleika at vita, hvussu uppgávan verður loyst tekniskt ella tí tað ikki ber til at greina váðabýtið ella fíggjarligu samansetingina av uppgávuni.

**Kunning av útboðum**
Allir viðkomandi partar eiga at fáa møguleika at kunna seg um útboðskunngerðir og tilboðsfyrispurningar. Kommunan hevur tí ábyrgd av og skal tryggja, innkeyps- og útboðsvirksemi hjá TK er nóg væl lýst.

TK hevur til hetta endamál ment ein útbjóðingarportal, har allir føroyskir veitarar hava møguleika at skráseta seg. Endamálið er at miðsavna allar útboðskunngerðir og tilboðsfyrispurningar og tryggja, at veitarar fáa javnbjóðis kunning um útboðsvirksemi hjá TK.

Útboðskunngerðir og tilboðsfyrispurningar, sum fara av rakstrarjáttanini hjá TK skulu umvegis útboðsportalin hjá TK.

**Menning og broyting í politikkinum**
Innkeyps- og útboðspolitikkurin kann eftirmetast eftir tørvi. Tað er Fíggjarnevndin og Býráðið, ið samtykkja politikkin.

Seinast samtyktur tann 23.10.2025

**Innanhýsis ábyrgdarbýti**



**Lyklaorð fyri væleydnað keyp**

Tá hugt verður at kanningum, sum kommunur í grannalondum okkara hava gjørt ella hava latið gera, eru ávís tilmæli, ið eru afturvendandi fyri at uppnáa eina úrslitagóða skipan av innkeyps- og útboðsuppgávuni. Hesar eru millum annað:

**Innkeypsmálsetning**

Orða greiðan málsetning og tryggja at leiðslan rótfestir hesa.

**Sjónliggerð innkeyp og útboð**

Staðfesta hvørji økir skulu vera partur av innkeyps- og útboðspolitikkinum og sjónliggera hesi innan- og uttanhýsis. Ger eina møguliga útboðsætlan, so møguligt verður at fylgja upp.

**Gjøgnumskygni**

Mannagongdin fyri innkeyp og útboð skal vera væl umhugsað og fyrireikað, løtt atkomilig og løtt at skilja. Greið vegleiðing skal fyriliggja um, hvussu útboð fer fram, hvat verður væntað av tilboðsgevarum og hvat dentur verður lagt á, tá valt verður millum veitarar. Gjøgnumskygni skal tryggja, at allir brúkarar hava álit á innkeyps- og útboðspolitikkinum.

**Foreinkling**

At innkeyp og útboð av produktum og tænastum er so foreinklað sum gjørligt. Endamálið við foreinkling er at gera tað lættari og harvið effektivari fyri báðar partar at hondheva keypsavtaluna.

**Bindandi avtalur og vav**

Ger bindandi avtalur og placera ábyrgd fyri avtalurnar. Bæði bindandi avtalur og foreinkling stuðlar uppundir at økja um vavið á avtalunum, og harvið uppnáa effektivisering og lægri kostnaða.

**Fokus á innkeyp og útboð**

Set fokus á innkeyp og útboð í bygnaðinum. Ger eina greiða arbeiðs- og ábyrgdarfordeiling. Í samband við útboð verður rátt til at taka brúkarar við í samband við kravspecifisering og ger av útboð.

**Førleikar og upplæring**

Tryggja at starvsfólk, ið fáast við innkeyp hava neyðugu førleikarnar, at yvirhalda veitaraavtalur. Tryggja at neyðug kunning og upplæring verður gjøgnumførd á øllum viðkomandi stovnum.

| Lyklaorð |
| --- |
| Innkeypsstrategi  - Sjónliggerð innkeyp og útboð – Gjøgnumskygni – Foreinkling – Bindandi avtalur og vav – Fokus á innkeyp og útboð – Førleikar og upplæring |